Hesum fara vit at strí›ast ímóti til tann beiska enda

– Vit eru rættiliga á gosi um n‡ggja uppskoti› hjá landsst‡rinum um, hvussu ósemjur á arbei›smarkna›inum skulu loysast, sigur Joan Ziskason, forkvinna í Sjeymannabólkinum hjá fakfeløgunum

ARBEI‹SMARKNA‹UR
Áki Bertholdsen

– Hesum fara vit at strí›ast ímóti til tann beiska enda.

Joan Ziskason, forkvinna á Sjeymannabólkinum hjá fakfeløgunum er púra avgjørd, tá i› hon ver›ur bi›in um eina vi›merking til n‡ggja uppskoti´hjá landsst‡rinum um, hvussu arbei›sósemjur á arbei›smarkna›inum skulu loysast hereftir.

Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur í vinnumálum, hevur n‡liga barsla› vi› einum n‡ggjum uppskoti um seming,, sum nú er sent fakfeløgunum til ummælis. Men ta› er longu nú greitt, at landsst‡risma›urin fer at møta har›ari mótstø›u frá fakfeløgunum.

Fakfelagslei›arar eru ikki bara á einum máli um, at uppskoti› skal vísast aftur. Teir eru eisini púra samdir um, at uppskoti› er so álvarsligt, at ta› skal heilt einfalt ikki setast í gildi, so-lei›is sum ta› nú er or›a›.

Í Sosialinum leygardagin mælti Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbei›arafelag heilt einfalt til at fara í a›alverkfall, um uppskoti› ver›ur samtykt, so-lei›is sum ta› nú er or›a›.

Í størsta álvara

Ingeborg Vinther ikki einsamallur fakfelags-lei›ari, sum ætlar at geva landsst‡rinum ein skarpan gang í hesum máli.

Joan Ziskason, forkvinna í Sjúkrasystrafelagnum og forkvinna í Sjeymannabólkinum hjá fakfelgunum, er næstan líka grei›.

– Hesum fara vit at strí›ast ímóti til tann beiska enda, sigur hon.

Hon sigur, at Sjeymannabólkurin, sum umbo›ar allan arbei›smarkna›in, fer nú at hava fund um máli›. Hon sigur, at orsøkin til mótstø›una, er uppskoti› hjá landsst‡rinum ger seg grovliga inn á rættindindi hjá fakfeløgunum.

– Eitt nú gevur ta› semingsmonnunum at kalla óavmarka›ar heimildir at útseta verkfall, og ta› er í veruleikanum at taka verkfallsrættin frá okkum.

Joan Ziskason sigur, at av tí at eitt uppskot, sum hetta, er so avgerandi fyri fakfeløgini, vilja feløgini sjálvsagt eisini vera vi› til at evna ta› til.

Hon vísir á, at fakfeløgini vilja fegin hava eitt n‡tt uppskot um seming.

– Men ta› skal ikki síggja út sum hetta.

Hon sigur, at partar av uppskotinum, sum nú er lagt fram fyri feløgini, minnir ikki sørt um ásetingarnar í donsku lógini um arbei›srætt og høvu›savtalu, og sum føroysku fakfeløgini hava strí›st ímóti vi› hond og fót

Joan Ziskason sigur, at hetta er eitt mál, sum fakfeløgini taka í størsta álvara.

– So vítt hon skilir, er semja um, at feløgini eiga at hava eitt rættiliga kontant útspæl ímóti landsst‡rinum fyri at for›a fyri, at hetta uppskoti› ver›ur sett í verk.

Men um ta› skal ver›s so kontant, sum Ingeborg Vinther, mælir til, vil hon ikki siga.

– At fara í a›alverkfall eru hennara or›. Hvør ni›urstø›an ver›ur, veit eg ikki enn. Men vónandi ver›ur ta› óney›ugt at fara so ógvusliga til verka, tí vónandi hava politikarar skilt bo›skapin, sigur Joan Ziskason.

–Hetta er eitt mál, sum vit taka í størsta álvara og vónandi hava politikararnir skilt bo›skapin, sigur Joan Ziskason, forvkinna í Sjeymannabólkinum hjá fakfeløgunum

Lógarbroyting skal gera føroyskt til tjó›armál

Jóannes Eidesgaard vil hava grein 11 í heimast‡rislógini broytta, solei›is at hon sta›festir, at Føroyskt er tjó›armál í Føroyum

MÁLSTRÍ‹I‹
John Johannessen

Forma›ur Javna›arfloksins ætlar sær nú at fáa sta›fest vi› lóg, at føroyskt er tjó›armáli› í Føroyum.

Hetta ætlar Jóannes Eidesgaard skal gerast vi› at broyta grein 11 í heimast‡rislógini, solei›is at har kemur at standa »Føroyskt er tjó›armál í Føroyum« í sta›in fyri » Føroyskt ver›ur vi›urkent sum høvu›smál, men danskt skal lærast væl og vir›iliga, og danskt kann eins væl og føroyskt n‡tast í almennum vi›urskiftum«.

Tí hevur Jóannes Eidesgaard lagt eitt uppskot til samtyktar fyri tingi›, um at heita á landsst‡ri› um at taka upp samrá›ingar vi› donsku stjórina um at fáa hesa broyting framda í verki.

Sta›fest minnilutamál

Føroyska máli› er í dag sta›fest at vera eitt minnilutamál. Hetta hendi, tá danski uttanríkisrá›harrin gó›kendi evropeiska sáttmálan um minniluta- og landspartamál.

Á›renn hetta var› gjørt, heittu føroyingar á danska uttanríkisrá›harran um at skipa solei›is fyri, at sáttmálin sta›festi føroyskt sum tjó›armál. Men danski forsætisrá›harrin vísti til or›ingarnar í grein 11 í heimast‡rislógini og sta›festi solei›is, at føroyskt er høvu›smál, men at danskt skal lærast væl og vi›iliga, og at danskt eins væl og føroyskt kann n‡tast í almennum vi›urskiftum.

Hetta hevur sí›ani skapt øsing millum politikarar í Føroyum, og Jóannes Eidesgaard er harta›ur fyri ikki at hava n‡tt sínar heimildir sum fólkatingslimur nóg væl í hesum máli.

Besta loysnin

Jóannes Eidesgaard sta›festir, at landsst‡ri› vi› n‡ggja sjálvst‡risleistinum ætlar sær at ver›a verandi í ríkisfelagsskapinum tey fyrstu mongu árini. Tí heldur hann eina broyting í heimast‡rislógini vera bestu loysnina at fáa sta›fest føroyskt sum tjó›armál.

— Sambært Niels Helveg Petersen er ta› grein 11, i› bindur. Tí eigur máli› at kunna loysast, um grein 11 ver›ur broytt. Hetta er veruliga ein vegur, i› til ber at ganga fyri at fáa málspurningin loystan, sigur Jóannes Eidesgaard.

Forma›ur Javna›arfloksins vísir á, at nú má vera li›ugt at ilskast um, at føroyska máli› var› illa vi›fari›, tá evropeiski málsáttmálin var› gjørdur. Hann vísir á, at politikkur má vera at loysa mál í sta›in fyri at ilskast, og tí heldur hann, at løgtingi› eigur at taka undir vi› uppskotinum.

– Tekur løgtingi› undir vi› hesum uppskoti, so rokni eg vi›, at restin ver›ur ein avgrei›sluspurningur. Eg kann ikki hugsa mær, at danir fara at vera ímóti einari slíkari broyting, sum eitt samt løgting tekur undir vi›, sigur Jóannes Eidesgaard.

Jóannes Eidesgaard hevur ikki spurt seg fyri hjá hinum flokkunum, um teir taka undir vi› uppskotinum, men hann sigur, at hann vildi mett, at hetta er eitt uppskot, sum tingi› kann taka undir vi›.

Drúgv mannagongd

Tekur løgtingi› undir vi› uppskotinum hjá Jóannes Eidesgaard, skal ta› ígjøgnum eina drúgva mannagongd, á›renn heimast‡rislógin kann ver›a broytt og føroyskt er sta›fest sum tjó›armál.

Fyrst skal landsst‡ri› fyrireika seg til samrá›ingar vi› donsku stjórina. Tá samrá›ingarnar eru av, skal broytingin leggjast fyri løgtingi› á føroyskum og fyri fólkatingi› á donskum. Og skal broytingin koma í gildi, skulu bæ›i fólkatingi› og løgtingi› samtykkja hana.

Ver›ur broytingin samtykt, skal danski uttanríkisrá›harrin bera so í bandi, at evropeiska yvirl‡singin ver›ur broytt, solei›is, at hon sta›festir, at føroyskt er tjó›armál í Føroyum.



Jóannes Eidesgaard vil hava løgtingi› og fólkatingi› at broyta grein 11 í heimast‡rislógini, so hon sta›festir, at føroyskt er tjó›armál í Føroyum